## Missa bilarnar

Í fjør høvdu nógvir norðmenn ilt við at gjalda billánið, og tað hevði við sær, at 40 prosent fleiri bilar vórðu seldir á tvingsilssølu í fjør enn árið fyri. Tað skrivar blaðið Aftenposten. Blaðið skrivar, at tað tað eru bilasølur og figgingarstovnar, sum taka bilarnar aftur, tí eigararnir megna ikki at gjalda. Gevur uppboðssølan meiri, enn eigarin skyldar í bilinum, fær eigarin munin, Men gevur sølan harafturímóti minni enn tað, sum eigarin skyldar, skal hann gjalda tað, sum restar í. Tað er kreppan, sum ger, at nógvir bileigarar hava ilt við at gjalda, skrivar Aftenposten.



## Koralriv í vanda

Fleiri stovnar og felagsskapir í Noregi eru sera misnøgdir við, at myndugleikarnir hava gjørt av at loyva oljufeløgum at leita eftir olju á leiðum, sum eru kend fyri síni koralriv. Bæði Havrannsóknarstovnurin og Stýrið fyri Náttúruumsiting mæltu myndugleikunum frá at loyva oljuleiting á leiðum við koralrivum, men til fánýtis. Granskarar hava víst á, at koralrivini hava stóran búsksparligan týdning, tí fleiri fiskasløg halda til har. Myndugleikarnir siga, at tað kann eisini fáa stóran búsksparligan týdning, um olja verður funnin á teimum nýggju leiðunum.

# Stórt hugnakvøld í Skálanum



**Leygarkvøldið 20. mars kl. 19 skipar stuðulsfelagið »Dragin« fyri stórum borðhaldi við sangi, undirhaldi og dansi**

HUGNAKVØLD

Seinastu vetrarnar hevur tað verið fastur táttur hjá Stuðulsfelagnum »Dragin« at skipa fyri einum hugnakvøldi í Skálanum. Undirtøkan hevur altíð verið sera góð, og tað er tíðiligt, - at tey tilkomnu eisini av og á treingja til at fara út og stuttleika sær - eins væl og tey ungu.

Leygarkvøldið 20. mars kl. 19 verður so hugnakvøldið, har skipað verður fyri borðhaldi við (heitum) mati, sangi og undirhaldi.

Borðhaldið verður frá kl. 19 - 22.30. Frá kl. 23 verður góður gamlamannadansur, har Flemming og vinmenn spæla.

Inntøkurnar frá tiltakinum fara allar til at stuðla Skúlsskipinum »Dragin«, har skúlaungdómurin lærir sjómansskap umborð um veturin, og eisini lærir at sigla við seglum um summarið.

## Bíða eftir nevningatingi

**Varðhaldsfongslingin av tveimum litavum í Føroyum varð mánadagin longd við fýra vikum. Teir koma helst at sita longur enn so, tí teir skulu væntandi fyri nevningating, ið skal fyrireikast**

FØROYA RÆTTUR

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Tveir litavar, sum hava sitið varðhaldsfongslaðir síðan november í Føroyum, góðtóku í gjár, at varðhaldsfongslingin varð longd við fýra vikum.

Menninir eru skuldsettir fyri at hava innflutt stóra nøgd av sterkum rúsevnum í bili sínum. Rúsevnini vóru ikki ætlað til føroyska marknaðin. Menninir høvdu ætlað sær at farið beint til Íslands, men tollararnir kannaðu bilin so væl, at teir blivu ov seinir, og seinni vórðu so rúsevnini funnin í bilinum.

Líka til fyri tveimum vikum síðan sótu menninir avbyrgdir, men tá ið Føroya rættur ikki vildi tað meira, varð annar maðurin fluttur til Danmarkar at sita í varðhaldi, so menninir ikki fingu tosað saman.

Tað gongur ein tíð enn, til málið kemur fyri rættin, tí teir skulu væntandi fyri nevningating. Enn er arbeiðið við at fyrireika nevningating ikki farið í gongd.

# Keyp ferðaseðilin beinleiðis á smyrilline.fo




TÍÐINDASKRIV

Nú ber til at keypa ferðaseðil við Norrønu beinleiðis á heimasíðuni hjá Smyril Line. Nýggja tænastan er umráðandi liður av arbeiðinum hjá Smyril Line at laga seg til tørvin hjá kundunum. Í hesum døgum er tað sera umráðandi, at kundin kann keypa sín ferðaseðil alt samdøgrið og at tað er einfalt og lætt.

Skipanin er ment saman við veitaranum av bookingskipanini hjá Smyril Line, Novedas, og í fyrstu syftu verður skipanin tøk á føroysku heimasíðuni. Seinni verður hon løgd á ensku, donsku og týsku heimasíðurnar.

# Ov nógv kom inn

**Kassameistarin hjá EB/Streymi, sum eisini var bókhaldari hjá Formula.fo, endaði í einum óhepnum dupultleikluti, tá hann flutti felag sínum ov nógvan stuðulspening frá arbeiðsplássi sínum**

Sum so nógvar aðrar fyritøkur, hevur Formula.fo stuðulsavtalur við ítróttarfelag. Ein av hesum er við EB/Streym, men við árslok í fjør gjørdi bókhaldarin hjá Formula.fo leiðsluna í fyritøkuni varuga við, at EB/Streymur hevði fingið ov stóra upphædd flutta.

Men samstundis sum maðurin var bókhaldari hjá Formula.fo, var hann eisini kassameistari hjá EB/Streymi, so her var hann endaður í einum serstakliga óhepnum dupultleikluti, sum hann eisini hevur átikið sær fulla ábyrgd av.

– Viðkomandi persónur var sera keddur um feilin og kom sjálvur inn á skrivstovu mína og segði seg úr starvi. Hann hevði gjørt ein bukk av stórum ósketni, tók alla ábyrgd av feilinum og vildi sjálvur gjalda peningin aftur, sigur forstjórin í Formula.fo., Fróði Magnussen, við Norðlýsið.

– Vit gjørdu greitt, at peningurin mátti gjaldast aftur og tað skal sigast beinanvegin, at talan er ikki um meira pening, enn at ein vanligur persónur sjálvur hevði kunnað goldið okkum tað aftur. Vit eru nøgdir við, at málið verður avgreitt.

Umframt, at bókhaldarin hevur sagt starvið hjá Formula.fo frá sær, hevur hann eftirfylgjandi eisini sagt seg frá sum kassameistari í EB/Streymi, har tey ikki síggja hetta sum eitt mál, ið hevur nakað við felagið at gera.

– Hetta er ikki eitt mál hjá okkum, tí vit eru ikki blandaðir upp í tað, og hetta hevur heldur onga ávirkan á tað virksemi, sum vit hava. Sum eg skilji, er hetta avgreitt millum viðkomandi og arbeiðsplássið og hevur einki við sjálvt felagið at gera, sigur formaðurin í EB/Streymi, Rólant Højsted, í stuttari viðmerking.

**hil**